Kyndil-Stjørnan 22-29 (10-14):

# Munur er framvegis á

**Vónirnar hjá Kyndli um veruliga at gera um seg í endaspælinum fingu eitt álvarsligt skot fyri bógvin, tá tær á heimavølli fingu av at vita frá Stjørnuni**

HONDBÓLTUR – KVINNUR
*Jákup Mørk*

Spenningurin var størri, enn hann so ofta hevur verið hjá Kyndli í ár, tá tær sunnudagin tóku ímóti Stjørnuni.

Hóast liðini bæði hava hildið til í hvør sínum enda av stigatalvuni í vetur, so góvu seinastu umførini undan jólasteðginum ábendingar um, at broytingar kanska vóru í væntu. Tí meðan Kyndil brádliga fekk savnað sær fleiri stig, tóktist Stjørnan fullkomuliga at steðga upp, eftir at tær mest sum høvdu útspælt FM-leiklutin, tá tær taptu heimadystin ímóti VÍF.

## Brast eftir eitt korter

Dreymurin hjá Kyndli um at basa Stjørnuni varð tó væl og virðiliga gjørdur til einkis, tí tá tvær ferðir 30 minuttir vóru leiktir, hevði Stjørnan vunnið ein ruddiligan sigur.

At byrja við vóru tó fleiri tekin um, at talan lættliga kundi gerast um ein heilt spennandi dyst. Stjørnan byrjaði kanska betri, men Kyndil fekk tó skjótt tamarhald á verjuni, og tá álopsparturin so eisini fekst at rigga, togaðu tær seg skjótt upp aftur til mótstøðuna.

Um miðjan hálvleikin fór tó at ganga skeiva vegin. Stjørnan megnaði at tippa somikið væl fyri í verjuni, at ferðin mest sum fullkomuliga fór av kyndilsspælinum, soleiðis at royndirnar í stóran mun vórðu avmarkaðar til skot útifrá. Álopsparturin hjá gestunum var kanska framvegis ikki so sannførandi, men tá tær fingu læst málið í 12 minuttir, kundu tær so líðandi økja um munin.

Hevði Kyndil eina vón um at venda gongdini, tá farið varð undir seinna hálvleik, so var tó skjótt, at hendan brast. Stjørnan økti alt fyri eitt um munin, og so kom eyðsýndi munurin millum eitt botn- og eitt oddalið aftur til sjóndar.

Kyndilsleikararnir ásannaðu, at dysturin var taptur. Góvust upp at við at stríðast, og tó at Stjørnan als ikki spældi upp til tað, sum tær eru førar fyri, so høvdu tær ongar sum helst trupulleikar av at koyra sigurin heim seinastu longu


*Hóast tær vunnu trygt, so sannførdi Stjørnan ikki um, at silvurmerkini eru ein sjálvfylgja hjá teimum. Ikki minst tí spælið í alt ov stóran mun er savnað um fáar leikarar*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

løtuna.

## Sannførdu ikki

Hóast tær við hesum aftur fingu ein tryggan sigur, so bendi dysturin langt frá á tað borðið, at Stjørnan hevur vunnið seg úr naggatódnini, sum liðið hevur verið í seinasta mánaðin ella so.

Hesa ferð gekk tað, men tað er so langt ífrá víst, at tað eisini er nóg mikið móti VB ella Neistanum, at mest sum alt spælið bert gongur um tveir ella tríggjar leikarar. Skal metast efitr fólkinum, so er lítið at ivast í, at Stjørnan eigur silvurmerkini, men nøvnini í sjálvum sær gera ongar skreytir. Skulu silvurmerkini gerast veruleiki, er snøgt sagt neyðugt, at liði virkar betri sum ein eind.

Hjá Kyndli varð dysturin mest sum ein staðfesting av, at tað heldur ikki verður í ár, at nakrir skreytlutir skulu savnast saman. Eftir góða endaspurtin í grundspælinum vildi ein sigur hesa ferð annars verið eitt fitt skump framá. Nakað sum kundi givið áræði, vilja og mót til komandi dystirnar í endaspælinum.

Spurningurin er so, hvørja ávirkan greiða tapið fær. Seinasta álmanakkaárið hevur kanska verið hitt tyngsta hjá kyndilskvinnunum í fleiri ár, og tí er vandi fyri, at tær aftur fella í óndu ringrásina, har lítið og einki ber til, og har allir marginalar eru ímóti.

Liðið telir tó somikið frægar leikarar, at tær hóast alt kunnu hava eina grundaða vón um, at hetta ikki verður støðan, men tá tú ert vanur at stríðast í oddinum, so óhugaligt um tú brádliga ert í botni, og at venja seg til hendan veruleika er kanska tað, sum Kyndil hevur størstu trupulleikararnir av í løtuni.

### Dysturin í tølum

**Kyndil-Stjørnan 22-29 (10-14)**

Málskjúttar:
Kyndil: Lotte Sørensen 8(5), Annika Ljósstein 7, Palma Petersen 2, Anja Johannesen 2, Ann Mari Wang 1, Marjun Tróndarson 1, Linda Weihe 1
Stjørnan: Joan M. Joensen 9(1), Simona Dziugyte 6(1), Andrijana Milodanovic 5, Anna Kristina Samson 5, Una Olsen 3, Beinta Klakstein 1
Brotskøst: Kyndil 6, Stjørnan 4
Útvísingar: Kyndil 6, Stjørnan 5
Diskvalifikatión: Stjørnan 1 (3X2 minuttir)
Dómarar úr Neistanum: Hjalmar Petersen & Kristian Johansen. Tóktust fyri tað mesta bæði avgjørdir og sannførandi.

VB-Neistin 17-17 (10-10):

# Helena bjargaði Neistanum

**Við javnleikinum heldur VB framhaldandi fast um bronsuvónina, tó at tær helst iðra seg um, at tað ikki eydnaðist at vinna bæði stigini**

HONDBÓLTUR – KVINNUR
*Jákup Mørk*

Longu í fyrsta dystinum í endaspælinum hevði Neistin møguleikan at skræða seg leysan í bronsustríðnum. Vunnu tær dystin móti VB, gjørdist munurin fýra stig, og soleiðis sum úrslitini hava lagað seg, hevði tað í øllum førum verið tungt hjá VB at vunnið hetta aftur. Hinvegin kundi VB við einum sigri syrgja fyri javnstøðu í hesum stríðnum.

## Helena læsti

Tá avtornaði, so gjørdist hvørgin parturin vinnari, og sum so kunnu bæði liðini vera bæði nøgd og minni nøgd um hetta.

Neistin er kanska liðið, sum best kann liva við hesum úrslitinum, og mett eftir dystargongdini, so vóru tað so avgjørt eisini tær, sum høvdu mest at fegnast um, tá dysturin var liðugur.

Eftir at Neistin hevði havt betru byrjanina, so setti heimaliðið veruliga ferð á seinasta korterið undan steðginum, og í seinna hálvleiki hildu tær á fram við góðu gongdini. Eitt skifti vóru tær á odda við fýra málum, men spakuliga fekk Neistin togað seg innaftur.

Ikki minst var tað Helenu Dam í málinum at takka, at VB bert skeyt trý mál seinasta korterið av dystinum, tí tað kundi sum so gera tað sama, um VB-kvinnur vóru leysar við henni, ella um roynt varð frá brotskasts-strikuni. Landsliðsmálverjin tók tað, sum kom, og var hetta nóg mikið at tryggja gestunum annað stigið og harvið framhaldandi fyrimun í bronsustríðnum.


*Fleiri ferðir í seinna hálvleiki hevði VB møguleika at avgera dystin, men inn um Helenu Dam vildi bólturin ikki*
*Mynd: Áki Bertholdsen*

### Dysturin í tølum

**VB-Neistin 17-17 (10-10)**

Málskjúttar:
VB: Regina Radó 9(2), Eyðbritt Krosslá 3, Gabriella Fekete 3, Gurið Mortensen 1, Sólrun Krosslá 1
Neistin: Katrin á Neystabø 4(2), Mildrið Jacobsen 4, Súna Mørk 3(1), Rakul Augustinussen 2, Kára á Dunga 1, Susan Brockie 1, Birita Wardum 1, Gunnleyg Berg 1
Brotskøst: VB 3, Neistin 5
Útvísingar: VB 1, Neistin 1
Dómarar úr TB: Birgir Dimon & Kári Niclasen



# Hallur vann ársins fyrstu rennikapping

**Leygardagin varð skipað fyri ársins fyrstu rennikapping, einum hálvmarathon í Eysturoy**

RENNING
*Tíðindaskriv*

Teinurin byrjaði nakað inn eftir vegnum til Funningsfjørð árakað bergholið. Runnið varð úteftir millum Fjarða, framvið Skálafjørðinum og út á Tofta kei.

Hóast nakað av iva var um veðrið undan kappingini, vórðu líkindini av teimum bestu hjá teimum 8 rennarunum, ið tóku lut í kappingini. Fyrstu 5 kilometrarnar var eitt lot undan, og restina av teininum var at kalla stilli.

Longu stutt eftir startin kom spjaðing í. Cecil og Hallur løgdu harðast út. Síðan kom fyrst Óli og síðan Flemming. Næstir teimum fylgdust Robert og Olaf. Og síðan fylgdust Jóan Petur og Regin.


*Hallur Holm vann fyrstu rennikappingina á árinum, tá kapping í hálvum marathon varð hildin í Runavík*

## Gekk javnt

Teir fremstu báðir fylgdust mestsum allan vegin. Bert fýra sekund skildu teir, tá teir komu á mál á Toftum. Hallur vann við 1.19,12. Hetta er nakað seinni enn teir 1,11, hann rann seinasta heyst, men hann venur ikki so nógv beint nú.

Hinvegin rann Cecil bert 14 sekund seinni enn sítt persónliga met. Og tá hugsað verður um, at fleiri brekkur eru á leiðini út á Toftir, má hetta sigast at vera ein góð tíð hjá Cecil.

Óli kom tryggur inn á triðja plássinum. Men í bardaganum um fjórða plássið mátti ein spurtuppgerð til. Nakað áðrenn teir komu á mál, megnaði Olaf at koma framm á og fara framvið Flemming. Hinir tríggir komu hvør í sínum lagi.

Luttakararnir í kappingini vóru væl nøgdir við ein hugnaligan túr í góðum líkindum. Vónandi fer ein kapping so tíðliga á árinum at geva teimum áræði at koma í enn betri venjing í ár enn undanfarin ár.

Næsta kapping verður væntandi seint í mars ella fyrst í apríl. Tað verður tann vanliga 10 km kappingin í Runavík.

## Úrslitini

**hálvmarathon á Toftum 5.1.2002**

| Pláss | Navn | Árg. | Felag/Staður | Tíð |
|---|---|---|---|---|
| 1 | Hallur Holm | 1968 | Bragdið | 1.19,12 |
| 2 | Cecil Weihe | 1965 | Bragdið | 1.19,16 |
| 3 | Óli Olsen | 1949 | Bragdið | 1.30,16 |
| 4 | Olaf Olsen | 1967 | Roysnið | 1.35,38 |
| 5 | Flemming Petersen | 1960 | Roysnið | 1.36,02 |
| 6 | Robert Vilhelmsen | 1951 | Bragdið | 1.39,24 |
| 7 | Regin I. Jóanesarson | 1945 | Vestmanna | 1.52,50 |
| 8 | Jóan Petur Olsen | | Norðragøta | 1.58,40 |

## Hondbóltsstøður

### 1. Deild kvinnur

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | VÍF | 1 | 1 - 0 - 0 | 381 | 232 | 149 | 14 |
| 2 | Stjørnan | 1 | 1 - 0 - 0 | 343 | 276 | 67 | 11 |
| 3 | Neistin | 1 | 0 - 1 - 0 | 279 | 243 | 36 | 9 |
| 4 | VB | 1 | 0 - 1 - 0 | 299 | 312 | -13 | 7 |
| 5 | Kyndil | 1 | 0 - 0 - 1 | 293 | 339 | -46 | 3 |
| 6 | Sóljan | 1 | 0 - 0 - 1 | 233 | 348 | -115 | 2 |
| 7 | StÍF | 0 | 0 - 0 - 0 | 200 | 278 | -78 | 1 |

Viðm.: Dysturin, Sóljan-StÍF, frá grundspælinum restar enn at spæla. Hesin verður sambært tillagaðu kappingarskipanini leiktur hin 12. januar

### 1. Deild menn

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Neistin | 1 | 1 - 0 - 0 | 392 | 316 | 76 | 12 |
| 2 | VÍF | 0 | 0 - 0 - 0 | 322 | 260 | 62 | 10 |
| 3 | StÍF | 0 | 0 - 0 - 0 | 326 | 315 | 11 | 6 |
| 4 | H71 | 1 | 0 - 0 - 1 | 353 | 372 | -19 | 6 |
| 5 | KÍF | 1 | 0 - 0 - 1 | 340 | 381 | -41 | 4 |
| 6 | Tjaldur | 0 | 0 - 0 - 0 | 290 | 332 | -42 | 4 |
| 7 | Kyndil | 1 | 1 - 0 - 0 | 301 | 348 | -47 | 4 |

Viðm.: Dysturin, VÍF-Neistin, frá grundspælinum restar enn at spæla. Hesin verður sambært tillagaðu kappingarskipanini leiktur hin 9. januar

## Máltindarnir

**Kvinnur:**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Simona Dziugyte | Stjørnan | 115 | (32) |
| Asta Petrauskine | Sóljan | 111 | (15) |
| Lotte Sørensen | Kyndil | 99 | (43) |
| Gabriella Fekete | VB | 90 | (21) |
| Ioana Rápa | VÍF | 90 | (23) |
| Joan M. Joensen | Stjørnan | 71 | (2) |
| Regina Radó | VB | 67 | (15) |
| Katrin á Neystabø | Neistin | 63 | (31) |
| Ileana Manulescu | StÍF | 59 | (8) |
| Sóley Mikkelsen | VÍF | 58 | (10) |
| Nicoleta Radu | VÍF | 56 | (1) |
| Annika Ljósstein | Kyndil | 56 | (9) |
| Anna K. Samson | Stjørnan | 54 | (1) |
| Jacklin Durhuus | VÍF | 54 | (4) |
| Andrijana Milodanovic | Stjørnan | 52 | (6) |

**Menn:**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Costin Dumitrescu | StÍF | 85 | (26) |
| Bjarni Wardum | H71 | 81 | (17) |
| Jacob Jónsson | Neistin | 78 | (9) |
| Høgni Klein | Kyndil | 76 | (3) |
| Dragisa Stojovic | Tjaldur | 75 | |
| Halgir Dahl Olesen | H71 | 75 | (10) |
| Heini Joensen | Neistin | 74 | (21) |
| Finnur Hansson | H71 | 73 | (20) |
| Sámal Joensen | VÍF | 72 | (13) |
| Dorica Tomic | KÍF | 68 | (17) |
| Ingi Olsen | VÍF | 64 | (8) |
| Iljan Topic | KÍF | 63 | |
| Hans Áki Dal-Christiansen | Neistin | 62 | (6) |
| Artur Johansen | StÍF | 53 | (1) |
| Mortan Hansen | Tjaldur | 53 | (5) |

# Enn ein Lakju-maður til KÍ

**Bárður á Lakjuni fer komandi kappingarárið at royna seg í bestu deildini**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Eftir tvey – eftir egnum mátistokki – lak kappingarár er nú líkt til, at klaksvíkingar veruliga ætla sær at gera seg galdandi í fótbóltsoddinum í summar.

Síðani tað varð almannakunngjørt, at Kurt Mørkøre verður nýggjur venjari hjá KÍ, eru alsamt fleiri leikarasáttmálar fingnir í rættlag. Fleiri av verandi leikarunum gjørdu av, at teir eisini komandi árið verða í Klaksvík, og lagið mundi ikki gerast verri av, at tað eisini eydnaðist at fáa Heðin á Lakjuni heimaftur, eftir at hann í fjør hjálpti B36 at vinna fyrstu greipuna í felagssøguni.

Sunnudagin boðaði felagið so umvegis heimasíðuna, www.ki-klaksvik.fo, frá, at systkinabarnið hjá Heðini, Bárður á Lakjuni, hevur gjørt sáttmála við KÍ.

## Bregðir ikki úr ætt

Bárður, sum annars er leirvíkingur, hevur seinnu árini verið partur av liðnum hjá ÍF, og í fjør var hann ein av berandi kreftunum hjá liðnum, sum tó gjørdist akkurát ov stutt til at tryggja sær uppflyting til bestu deildina.

Hóast honum enn restar royndir í bestu føroysku fótbóltsdeildini, so er lítið at ivast í, at Bárður hevur evnini til at gerast ein veruligur styrkur á liðnum hjá KÍ, og í øllum førum lýgur navnið ikki, tá tað ræður um bóltførleikan.

Enn ber ikki til at siga, hvørt hetta er seinasti brikkurin í putlispælinum, men undir øllum umstøðum tykist longu greitt, at klaksvíkingar verða ein væl størri biti fyri mótstøðuliðini komandi kappingarárið, enn teir hava verið tey bæði undanfarnu.

*Í fjør var hann ein týdningarmikil liður á liðnum hjá ÍF, men komandi árið skal leirvíkingurin, Bárður á Lakjuni, royna seg í Klaksvík*

